# *Vegleiðing til WISEflow*

Næmingarnir rita seg inn á **roynd.skulin.fo** við sínum O365 brúkara.

Næmingarnir hava bert varðablaðið “Luttakari”.

Í varðablaðnum “Luttakari” síggja teir sínar gongdir, tær eru væl merktar, og bert tann gongdin, ið hoyrir til dagin og tíðina, er tøk at tata upp. Gongdin er grøn.

Næmingurin velur røttu uppgávuna, og velur síðan at byrja royndina.




Ovast í høgra horni stendur, hvussu nógvar síður eru í uppgávuni, har ber til at blaða millum síðurnar, bæði aftur og fram. Til ber  eisini at blaða niðast á hvørjari síðu.




Svarini verða goymd so hvørt, eisini um tú fert út úr uppgávuni.

## Í skipanini eru nakrar myndir, ið eru hentar at kenna.

Flaggið kann næmingurin nýta, um hann skjótt skal finna aftur til síðuna, har hann t.d. ikki gjørdi alt, ella vil endurskoða okkurt. Hann trýstir á flaggið, meðan hann er á síðuni og heldur síðan fram.



Fyri at finna síðuna aftur trýstir hann á yvirlitið, ið vísir yvirlit yvir allar síðurnar.



Nú sæst, hvør síða er merkt við flaggi.




Tá næmingurin er liðugur at loysa uppgávuna, er sera týdingarmikið, at hann letur inn.




Tá hann hevur trýst á "Far til innlating", kemur hesin skíggin fram:




Tá skal næmingurin velja "Eg ynski nú at innlata mítt uppgávusvar..............."

Tá broytist skíggin til hesa myndina:




Nú er bert at lata inn.

Er alt farið rætt fram, kemur henda myndin fram. Uppgávan er nú latin inn og liðug.



# Próvdømingaramboðið

Lærarin hevur fleiri varðabløð, eitt av teimum er “Próvdómari”. Her inni ber til at síggja, hvussu næmingarnir hava klárað seg í royndini.

Próvdømingaramboðið er ikki tøkt at brúka, fyrr enn innlatingarfreistin er farin.




Skalt tú hyggja at úrslitunum, so velur tú




Har ber til at síggja svarini hjá hvørjum einstøkum næmingi. Eisini sæst, hvussu hann hevur klárað seg sum heild, sí mynd:




Eisini ber til at síggja, hvussu næmingurin hevur klárað seg í hvørjum parti, sí mynd:



# Umsitari

Ert tú umsitari, kanst tú fylgja við, hvussu gongur hjá hvørjum næmingi, meðan royndin er, tá skat tú velja varðablaðið "Umsitari".

Vel uppgávuna, sum er í gongd. Niðast á tí síðuni eru luttakararnir, sí mynd:




Vel "Gongdareftirlit" so kemur hetta fram:




Her kanst tú fylgja við, hvussu gongst hjá næmingunum. Her kanst tú gera viðmerkingar og leingja um tíðina.

Her stendur eisini, um uppgávan er latin upp, og ikki minst, um hon er latin inn. Hetta er týdningarmikið at kanna, áðrenn næmingurin fer úr royndarhølinum, tí tá freistin fyri innlating er farin, kann tað gerast drúgt at lata inn.

Fyri at sleppa út aftur trýst á "Aftur til gongdarsíðu":




Um so er, at ein næmingur letur inn, áðrenn tíðin er farin, so kann uppgávan takast aftur:

Far inn á uppgávuna, vel varðablaðið “Grundleggjandi”. Niðast á tí síðuni skalt tú velja “Lutakaraupplýsingar”.




Nú sæst eitt flugubein hjá teimum, ið hava latið inn.




Trýst á flugubeinið, og hendan myndin kemur fram:




Vel “Gerðin skal fremjast” og “Hald fram”.




Nú er flugubeinið vekk, men **minst til**, at næmingurin stendur at hava latið inn í gongdaryvirlitinum.

Tá tú skalt taka eitt avrit av eini gongd.

Tú ert í varðablaðnum “Umsitari”, tú velur ta gongdina, ið tú vilt avrita.

Tá sær tað soleiðis út:




Ovast í vistra horni eru tríggjar strikur. Trýst har og vel tað, sum eitur: “Ger eitt avrit av gongdini”.




Nú ert tú har, ið tú kanst velja stillingar:




Tær týdningarmestu eru t.d. dagfesting, luttakarar, próvdómarar, umsitarar og uppgávur. Tá tú kemur inn her, er bert flugubein í "Stillingar", tú mást seta flugubein í tað, tú vilt hava við yvir í ta nýggju gongdina.

**GG! Tað er gott, at broyta navnið á gongdini eitt sindur, t.d. at seta eitt tal aftanfyri, annars er ringt at halda skil á, hvør er tann nýggja. Niðanfyri sæst, at navnið er broytt til "AFTURTØKA 1"**



Tá tú hevur sett tey flugubein, ið tú vilt hava, stovnar tú gongdina niðast á somu síðu.




Minst til at trýsta á “Ger gongd virkna”.

